# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**Leygardagur 5. juli:**
***Fuglafjarðar kirkja:*** kl. 21 Varmakelduvøka. Tónleikur og upplestur.

**7. sunnudag e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein, altargongd, skriftamál kl. 10,40.
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Ann D. Hansen.
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Heri J Joensen
***Argir:*** kl. 11 Hanus Simonsen altarg.
***Vestmanna kirkja:*** kl. 11- Mogens Tilsted Christensen, medvirkende Raymund og Annette Nielsen
***Sandavágur:*** kl. 11, Theodor E. D. Olsen
***Hvalvík:*** kl. 12, Inga Poulsen Dam
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs
***Gjógv:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 12.30 messa Emil Olsen
***Oyndarfjarðar Kirkja:*** kl. 12 við altargangi v/ Henning Bøgesvang
***Klaksvík:*** lestur kl. 11.00
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00, Niels Pauli Danielsen
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
***Skopun:*** kl. 12, altargongd: Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri føroysku Sjómansmissiónina.
***Sandvík:*** kl. 18 Jónsvein Bech.

**Hoyvíkar kirkja leygardagin 5. juli**
Kirkwall Town Band spælir konsert í Hoyvíkar kirkju leygardagin 5. juli kl. 16. Samstundis luttaka góðir næmingar frá Føroya Musikkskúla sum solistar. Birgitte Schnakenburg spælir á klaver. Ókeypis atgongd.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti. Onki morgunmøti í summar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur kl. 20 Bíbliutími.
Fríggjadagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 19 Møti við Jógvan Garðsá.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Leygardag kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 18 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 16.30 bøn fyri Ísrael og býnum v.m.
Sunnudagin samkomuútferð til Suðuroyar (tilmelding á 214067) – einki møti.
Mánakvøldið 7. juli kl. 20.00 Bønarskúlin

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti. http://www.gospel.fo

**Kedron, Sørvágur**
Mikudagin 2. juli kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin 6. juli kl. 11 Morgunmøti. Eingin sunnudagsskúli. Einki kvøldmøti.

**Nólsoy**
Møti verður í missiónshúsinum sunnudagin kl. 18 við Jónhilda og Gullak Hansen og fleiri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Innsavnavn verður fyri arbeiði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eydnan á Oyrarbakka**
Møti undir heitinum »Kristus er svarið« verður sunnukvøldið 6. juli kl. 18.00. Talari Hjalgrím Davidsen. Sangluttøka við Hannu og Terja.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Róa Norðoy.
Sunnudagin, morgunmøti kl. 11. Oasubrøðurnir vitna og syngja.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 2. juli kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími - Áps. 6,1-7 7 menn valdir til at greiða útbýtingina v/ Christian Joensen.
Hósdagur 3. juli kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur 4. juli kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagur 6. juli kl. 17 Møti - Tala: Jonhard Olsen, Saltangará.
Mikudagur 9. juli kl. 6 Bøn. kl. 20:00 Bíbiltími - Tema Martin Luther, v/Boga Olsen, Glyvrar.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 2. juli kl. 06:00: Bøn. Kl. 20:00: Bíbiltími, Áps. 6,1-7, 7 menn valdir til at greiða útbýtingina v/ Christian Joensen
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Jógvan Páll Sevdal talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sambýlið í Bøgøtu, Klaksvík**
Andakt hóskvøldið kl. 19.30 við Elsu Funding.

**KFUM & K Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 13 Viðlíkahaldsarbeiðið byrjar.
Leygardagin Handaligurleygardagur - kl. 9.00 Morgunmatur og andakt kl. 10.00 Farið verður í gongd við arbeiðið.
Sunnudagin kl. 17.30 Bønarløta,
kl. 18.00 Møti við Gimma Olsen.
Innsavnan til húsið.
Kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti v/ Ambu Rajamani, úr India (Stovnan av kristnum barnaheimi í India).
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn v/ morgunmati.
Sunnudagin kl. 11 er møti. Rói Norðoy talar. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 20. kap.
Sunnudagin kl. 18 møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskipari í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Teldupostur:tilhald@torshavn.fo*
Mánadagin 30. juni kl. 10.00 – 17.00 Opið hús.
Tilhaldið verður stongt frá 1. juli og til og við 15. august
Opið verður soleiðis á Ólavsøku:
Kjallarin: 28 – 30. juli kl. 16 – 20 Listaframsyning, Hergerð Joensen .
Miðhæddin: 28 – 30. juli kl. 16 – 20 Drekkamunnur og pannukøkur v/ Hanusarsúltitoyi.
Miðhæddin: 28. juli kl. 17.30 Stutt konsert og felagssangur við norska kórinum Fjelljom og Hans Iversen.

**Kunningastovan, Felagið Tórshavn**
Avgreiðslutíðir í summar frá 16. juni til 1. september:
Mánadag til fríggjadag er opið 8:00-17:30.
Mikudag er opið 8:00-20:30
Leygardag er opið 9:00-14:00

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit hava summarsteðg.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Vit eru farin í summarfrí. Byrja verður aftur mánadagin 18. august.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
er í summarfrí frá 18.06.2008. Opið verður aftur 02.09.2008.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 4. juli fyllir Sivert Eliasen, Fuglafjørður 90 ár. Dagurin verður hildin hjá Bernhardinu og Samson, Bøvegur 41 Fuglafjørð, frá kl. 16-20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Jenny Samuelsen 80 ár**
Sunnudagin, 6. juli, verður Jenny Samuelsen í Havn 80 ár. Dagurin verður hildin í Pállstovu millum kl. 13 og 17.

**80 ár**
Leygardagin 5. juli fyllir Elmar Jacobsen, Søldarfjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði leygardagin 5. juli frá kl. 1700 til 2100. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. juli hava Jonny og Áki Dimon, Trongisvágur, gulldbrúdleyp. Dagurin verður hildin í skúlahøllini í Trongsvági sama dag við brunch millum kl 10 - 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 20. juli hava Kathrina og Jacob Petur Jacobsen Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á hotel Norð á Viðareiði sama dag kl. 18.00. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. 444120

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 9. juli hava Esther og Óli Karl Hansen, Hvalvík, silvurbrúdleyp dagurin verður hildin í heiminum frá kl 17. Øll eru vælkomin.

**Konfirmatión**
Sunnudagin tann 6. juli 2008 verður dóttir okkara Elin Margreta Nolsøe Jacobsen konfirmerað í Skála Kirkju. Veitslan verður hildin í matarhøllini í Ítróttarhøllini á Skála og eru øll vælkomin eftir døgverða.
*Heilsan Gudrun og Eyðun Berth*

**Brúdleyp**
Leygardagin 5. juli kl 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Annfríð Jacobsen Klaksvík og Ragnar Poulsen Hvalba. Aftaná vígsluna verður reception í kjallaranum í Betesda. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. juli kl. 15.00 giftast í Sumbiar kirkju Edni Lisberg, Sumba, og Randi Gaarden, Kristiansund. Veitslan verður fyri innbodnum í samkomuhúsinum í Sumba kl. 19.00.

Leygardagin 19 juli. kl.15.00 giftast í Funnings kirkju. Gunnvør Fríðhild Juul. (Eiði) og Jógvan Olivur Kallsoy. (Eiði)
Nátturði verður í Eb-húsinum á Eiði frá kl. 18.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 12. juli kl. 14.30 giftast í Herlev kirkju Karla Vang Kjærbæk, Vágur, og Jacob Persson, Herlev. Vælkomst verður í heiminum á Gavlbakken 26, 2730 Herlev, frá kl. 16 til kl. 17.30. Aftaná verður veitsla fyri innbodnum.

14. juli giftast á Ráðhúsinum í Odense Eyðvør Thomasen av Tvøroyri og Paul Guest Hødersvej 13, 5200 Odense V.

Hósdagin 31. juli 2008 giftast Margith Olsen & Rainer Latupeirissa kl. 14 í Betesda, Klaksvík. Veitslan verður í kjallarinum í Betesda kl.18. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, eru hjartaliga vælkomin at tekna seg áðrenn 14. juli á telefon 456719 ella 227198
**Margith & Rainer**

Leygardagin 2. august kl. 15.00 giftast í Vágs Kirkju Rakul Borg og Arni Djurhuus Brattaberg úr Vági. Veitslan verður hildin í VB-húsinum kl. 19. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 210972 ella 374350 eftir kl. 20. Teldupost: rakulborg@hotmail.com innan 10. juli.

Leygardagin 2. august giftast í Skúvoyar kirkju Betty Hansen og Harry Jensen. Veitslan verður hildin í Skúgvi. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, eru hjartaliga vælkomin at siga frá innan 10. juli á tlf. 361459, 210028, 580791 ella send teldubræv til harryj@post.olivant.fo

Leygardagin 2. august kl. 15.00 giftast í Hoyvíkar kirkju Randi Vestergaard, Hoyvík, og Jóhann Hansen, Gøtugjógv. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, eru hjartaliga vælkomin í Marinargøtu 19 frá kl. 19.

Fríggjadagin 8. august giftast Halltóra Hansen Haldórsvík og Rúni Thomsen Argir. Vígslan verður í Haldórsvíkar kirkju kl. 15. Vælkomst verður í bygdahúsinum í Hósvík kl.18.30. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinaliga biðin um at siga frá á tlf: 284764 Halltóra og 794235 Rúni ella teldupost: runithomsen@hotmail.com innan 8. juli.

Leygardagin 9. aug. kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Rebekka Thorsteinsson og Finnbogi Magnussen úr Vági. Veitslan verður hildin í VB húsinum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. +47 71523009, 373749 ella 373422. Teldupost: fimagn@online.no innan 5. juli.

Leygardagin 16. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Jóhanna Hansen og Benny Hansen. Veitslan verður hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 447174 ella 253994 innan 1. august.

***Vit skulu giftast***
Leygardagin 23. aug kl 14.00, giftast í Eiðis kirkju Anna Maria M Kruse og Janus Knudsen. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl 18.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, vera vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. aug. við at ringja á tlf: 448070, Anna Maria 748070 ella Janus 588703.